Tórshavn, 21. mars 2026
**Tíðindaskriv frá Mentanargrunni Landsins**

# 13 filmsverkætlanir fingið stuðul

*17 umsóknir komu inn til hetta fjórða stuðulsumfarið, sum søktu um tilsamans góðar 6,7 mió kr.*

Stuðulsupphæddin, ið lutað verður út í hesum umfarinum, er góðar 2,3 mió kr.

Endamálið við stuðulsjáttanini er at framleiða og menna føroyskan film við denti á fiktiónsfilm, heimildarfilm og listafilm. Einstaklingar, bólkar og feløg kunnu søkja um stuðul til ymsar tættir innan filmsgerð.

Nevndin hevur viðgjørt umsóknirnar eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum er broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2015 og kunngerð nr. 3 frá 6. januar 2025.

Sum kunngerðin ásetur, hevur grunnurin sett tveir filmsráðgevar at meta um og gera tilmæli til grunnin. Avgerðin hjá nevndini um hvør fær stuðul til film, er bygd á tilmæli frá ráðgevunum.

Samlaða filmsjáttanin fyri 2026 eru 6,6 mió. kr. Stuðul til film verður veittur fýra ferðir árliga

Til fyrsta stuðulsumfarið í ár, Filmur I. 2026, hevur nevndin í Mentanargrunni Landsins tikið avgerð um at veita hesum 13 filmsverkætlanunum stuðul:

| ***Umsøkjari*** | ***Verkætlanarheiti*** | ***Slag av filmi*** | ***Játtað upphædd, kr.*** |
|---|---|---|---:|
| Heiðrikur B.T á Heygum | Díðrikur á Skarvanesi | Spælifilmur | 60.000 |
| FriisFrame v/Rúni Friis Kjær | Hol til helvitis | Spælifilmur | 200.000 |
| Hugmynd v/Eir í Ólavsstovu | Karyatida -Reivverur úr rúkandi toftum | Dokumentar | 100.000 |
| Svanna Christiansen | Seyðahundur | Animatiónsfilmur | 50.000 |
| GRÓ Studios v/Torfinnur Jákupsson | Reyna | Sendirøð | 300.000 |
| Outlier Projects v/Jón Hammer | Eydnuland | Spælifilmur | 96.300 |
| Outlier Projects v/Jón Hammer | Birita | Dokumentar | 100.000 |
| Niclas Joensen | Skúgvi - ræning frá landi og sjógvi | Dokumentar | 30.000 |
| Chili Film v/Ole Tornbjerg | Tjóðhild | Dokumentar | 100.000 |
| Outlier Projects v/Jón Hammer | Kópakonan | Spælifilmur | 150.000 |
| Outlier Projects v/Jón Hammer | Whistler | Spælifilmur | 1.000.000 |
| anna joensen-næs | Ansa eftir, børn spæla | Novellufilmur | 20.000 |
| Veyhe v/Jákup Veyhe | DRELNES | Sjónvarps/internetrøð | 120.000 |

Vegna nevndina fyri Mentanargrunn Landsins
Hedvig Westerlund-Kapnas, forfólk